## DAGSINS MEINING

# Fokus á útbúgving

Fríggjadagin var sera áhugaverd ráðstevna fyriskipað av Mentamálaráðnum í Norðurlandahúsinum, og evnið var, sum vit greiddu frá her í vikuskiftisútgávu okkara, gymnasialar miðnámsútbúgvingar. Orsøkin til ráðstevnuna er tann, at vit her í Føroyum standa frammanfyri stórum broytingum á útbúgvingarøkinum. Samfelagsbroytingarnar eru skjótar og ógvusligar, og henda gongd setir stór krøv til øll lið í útbúgvingarskipanini. Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur sett sær fyri at endurskoða føroysku miðnamsútbúgvingarnar. Tað man vera almenn semja um, at hetta er ein sera skilagóð avgerð í tøkum tíma. Tað má tí metast eisini at vera skilagott, at øll áhugað fáa høvi at ogna sær innlit í skipaninar í hinum norðurlondunum. Tað var júst hetta, sum var ein týðandi partur av endamálinum við ráðstevnuni.

Hvat kom so burturúr og hvat kunnu okkara skúlamyndugleikar læra av royndunum hjá grannum okkara? Myndin var tann, at broyttar samfelagsumstøður við broyttum vinnulívsbygnaði, globalisering og altjóðagerð krevja endurskoðan og broytingar. Skipa vit ikki útbúgvingarnar, so tey ungu kunnu fáa nógv betri miðnáms- og ungdómsútbúgvingar, so megna vit ikki at takla ta broyttu heimsmyndina, har stórir partar av arbeiðsplássunum fara at flyta til láglønarlond. Danmark hevur megnað hetta. Hóast arbeiðspláss í túsundatali verða flutt til Eystureuropa, Kina og nú eisini til Latínamerika, so er vinnuloysið í Danmark tað lægsta í áratíggjur. Hvussu ber hetta til? Jú, Danmark megnar at tillaga útbúgvingarskipanina soleiðis, at hon lýkur krøvini, ið fylgja við teimum ógvusligu broytingunum. Hjá dønum trýtur hugflogið ikki – eitt nú kemur meistaralæran aftur. Hetta er ikki fyri at skrúva tíðina aftur, men fyri at geva teimum, sum ikki eru so bókliga sterk, ein nýggjan tjans. Tey kunnu sum kunnugt vera sera hegnig og verður hetta eins styrki fyri skipanina.

Annars vóru lyklaorðini samskipan, smidleiki, opinleiki, nýskapan og nýhugsan. Áhugavert er, at tað gekk sum ein reyður tráður, at myndugleikarnir í okkara grannalondum kenna sera stóran tokka til og sýna stóra ábyrgd mótvegis tí ættarliði av ungum, sum í hesum árum streyma til miðnáms- og ungdómsútbúgvingarnar. Tað ræður um at fáa tey flestu við, at lofta teimum, sum fella frá og loyva øllum innaftur, sum ynskja tað. Hesin sera jaligi og sera fordómsfríi holdningur til tey ungu eyðkennir skúlamyndugleikarnar í okkara grannalondum. Fleiri av fyrilestrarfólkunum nevndu hetta, at tað snýr seg um tey ungu, um teirra val og trivnað – teirra lív, ikki bert um samfelagstørvin! Her hava lærarar, rektarar, embætisfolk og politikkarar okkara nakað at læra.

Flestu lond vilja, at 95% hvørjum árgangi skal hava eitthvørt slag av miðnams- ella ungdómsútbúgving eftir fólkaskúlan. Hetta eru høg mál og okkara myndugleikar hava ivaleyst fingið nakað at hugsa um her. Vónandi fer tann verkætlan við endurskoðan og samskipan av miðnámsútbúgvingunum, sum Mentamálarið nú fer í holt við, at føra til eina skipan, har vit koma á hædd við grannarnar og helst eisini gerast enn betur enn teir. Skulu Føroyar vera millum heimsins fremstu tjóðir í 2015, so má allur skúlaskapurin sum skjótast mennast til at vera millum tann besta í heiminum. Útbúgving er jú fortreytin fyri menning og vælferð – fyri at vit skulu kunna klára kappingina í eini altjóðagjørdari øld. Samantikið ein frálík ráðstevna, ið gav bæði íblástur og evni til umhugsan – eitt tiltak, sum tænir Mentamálaráðnum til æru.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Rættleiðing til tíðindini í ÚF

MAGISTARA-FELAG FØROYA

– tann 16. februar 2006 kl. 18:30 um trætuna millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya um gjald fyri vaktarhald.

Magistarafelagið ger púra greitt, at tíðindini frá fíggjarmálaráðharranum í ÚF í kvøld mugu vera tikin úr leysum lofti, og at felagið púrt einki kennir til tær upphæddir, ið landsstýrismaðurin ber fram.

Støðan er hon, at Magistarafelagið longu á fyrsta fundinum við Lønardeildina um málið, boðaði frá, at felagið einans krevur at fáa somu sømdir fyri vaktarhald, sum Fíggjarmálaráðið longu frammanundan letur til onnur feløg við samsvarandi fakligu bakgrund.

Faktum er, at Fíggjarmálaráðið longu letur øðrum feløgum omanfyri 30% av teirra tímaløn í samsýning fyri tilkallivakt, umframt yvirtíðargjald fyri ta arbeiðstíð, fólk verða kallað til arbeiðis.

Magistarafelagið boðaði á sama fundi frá, at felagið er sinnað at góðtaka eina aðra og lægri upphædd fyri sokallaða telefonvakt. Á næsta fundinum kom Lønardeildin við einum so fullkomiliga órealistiskum útspæli, at her reelt onki var at tosa seriøst saman um.

Páhaldi hjá ráðharranum byggir vónandi á misskiljingar og ikki á villleiðingar. Magistarafelagið fer tí at nýta høvið at biðja landsstýrismannin í fíggjarmálum um sjálvan at koma á fund við felagið at umrøða málið, soleiðis at vit har vónandi fáa tosað okkum til rættis um trupulleikan. Magistarafelagið hevur undir øllum samráðingunum víst góðan samráðingarvilja og vil ógvuliga fegið finna eina skilagóða og sømiliga loysn á hesum óhepna málið.

# Løgmaður og flosklarnir

JÓGVAN KELDU
Løgtingsmaður



**– Spurningurin er ikki um antin stutt- ella langsiktaður hugsunarháttur. Her fer løgmaður aftur upp um dagsins veruleikar, tí talan er sjálvsagt um bæði at hugsa stutt- og langsiktað, skrivar Jógvan við Keldu**

Eg eri vendur aftur til røðu, sum løgmaður helt á leiðaradegnum á Hotel Føroyum, prentað í Sosialinum 1. februar í ár. Kundi hugsa mær at gjørt onkrar smávegis fyribilsviðmerkingar.

Eitt kann av sonnum sigast um løgmann; hann dugir væl at orða seg, hevur sera hugtakandi taliorgan og er engageraður í sínum røðum.

»Frá filétfabrik til idéfabrik« kennist sum ein titul til eina skaldsøgu, har høvuðspersónurin kemur úr ongum til og gerst vitskapsmaður, og undir hesi yvirskrivt sigur hann m.a.: »Tú kanst velja at brúka mandatið til at stýra stuttsiktað t. v. s. í fýra ár, ella tú kanst velja at stýra langsiktað í kanska 10 ár ella longur.« – »Vit hava valt seinnu loysnina ..... vit hava ásannað, at tað er nú nýggjar leiðir mugu gangast«.

**Onnur lond flyta seg skjótt**

Lat meg gera greitt, at talan kann ongantíð vera um »antin – ella« í hesum føri. Tað er altíð vandamikið at leypa um veruleikan, tú í dag ert í, tí at framtíðin – um 10 ár – verður lættari. Tað land, ið trýr, at tað er komið longur um 10 ár og ikki tekur nútíðina grundiga í álvara og handlar skjótt, er komið ov stutt.

Sum nevndarformaðurin á General Electric, Jack Welch sigur: »Evnini hjá einum virki til skjótt at læra og umskipa tað lærda til avgerð, er ultimativi kappingarfyrimunurin«.

Tað er í dag avgerðir skulu takast, og at tað lærda í einum nú verður umskipað til avgerðir. – Tað gevur úrslit.

**Man løgmaður eiga tekstin**

Víðari sigur løgmaður: »Vit mugu flyta okkum. Vit mugu spæla ímóti teimum stóru. Vit mugu taka dystin upp. Vit mugu tryggja okkum, at vit duga snildir og tann taktikkin, ið gevur okkum fult stigatal hvørja ferð.«

Tað kann undra, um løgmaður sjálvur eigur hesi orð.

Eitt land hevur verið á fremsta plássi í eini hálvtannaðhundrað ár, nevniliga USA. Er tað nakar politiskur flokkur, sum hevur ákært hetta land fyri at brúka snildir og taktikk, og hvussu hetta land hevur gjørt seg inn á mannaættina, er tað júst flokkurin hjá løgmanni og løgmaður sjálvur.

Eisini kann dømið takast, um skjóta og gløgga avgerð, sum løgmaður kílaði niður, nevniliga einskiljingina av JFK, sum hann skírdi gjørda á nátt og tað sum grovari var, men sum eg ikki skal nema við í fyrstu syftu.

Tað kennist eitt sindur løgið, og fjáltur kemur á ein, tá løgmaður nú brádliga fer at tosa um snildir og taktikk fyri at skapa samfelagnum meiri kapital, tí verður hesin kapitalur ikki skaptur av ávísum persónum kemur hann ikki, og kapitalur skaptur av fáum ávísum persónum, er ikki nakar moralur, Javnaðarflokkurin kann standa inni fyri.

**Um ikki nýtt so øðrvísi**

Skulu vit yvirhøvur koma longur á leið sammett við londini uttan um okkum, skal annað huglag til. Tá skal politiska systemið ikki ræðast um onkur vinnur meiri pening enn ein annar.

Til seinast í hesum umfari fari eg at heita á løgmann og landsstýrissamgonguna, um at fara í eitt meiri veruleikakent og tættari samstarv við vinnulívið, fakfeløgini og aðrar partar út frá núverandi veruleika, og ikki at hesin verður umlopin. – Um ikki endiliga verður hugsað nýtt, so í øllum førum øðrvísi, tí tað kann eisini verða nýtt!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.